## DAGSINS MEINING

# Ein demokratiskur glotti

Nú ber til veruliga at staðfesta, at fólkaræðið av álvara aftur er komið í hásætið í Chile, nu sosialisturin Michelle Bachelet á valinum sunnudagin varð vald til forseta. Michelle Bachelet er fyrsta kvinna, sum er vorðin forseti í Suðuramerika og ikki í øllum Latínamerka, sum onkur vil vera við. Fyrsta kvinna, sum gjørdist forseti í Latínamerika, var Violetta Chamorro, sum fyri nøkrum árum síðani var forseti í Nicaragua.

Valið av Michelle Bachelet er ein søgulig hending. Tað eru bert tíggju ár síðani einaræðisharrin Pinochet misti valdið eftir drúgva tíð við kúgan og harðræði. Faðir Michelle doyði í fongsli eftir at hava verið píndur eins og so mong onnur demokratisk sinnað fólk í Pinochettíðini. Sjálv hevur Michelle Bachelet verið fangi hjá Pinochetstýrinum og somuleiðis verið fyri torturi. Tað er tí einki minni enn ein stórhending og ein veruligur sigur fyri fólkaræðið, at júst hon nú er vorðin forseti, vald á demokratiskum vali.

Síðan Pinchet varð koyrdur frá fyri 10 árum síðani, hevur eina samgonga av kristiliga flokkinum og sosialistunum stýrt Chile. Hóast hesir báðir flokkar upprunaliga stóðu fjart frá hvørjum øðrum, eitt nú tí at teir kristiligu hjálptu Pinochet at valdinum, so hevur samstarvið virkað og vignast væl. Teir kristiligu fingu jú skjótt at sanna, at eingin politiskur flokkur varð toldur undir Pinochet – heldur ikki teir kristiligu! Teir vendu sær tí, sum frá leið, móti einaræðisharranum. Tí fingu chilenar hesa sjáldsomu, men sera haldgóðu samonguna, sum hvur hildið í tíggju ár. Hetta hevur verið ein sera heppin samgonga, sum hevur megnað at lyfta Chile fram millum fremstu tjóðir í Latínamerika. Hetta er ein mið-vinstra samgonga, og hevur henda samanseting víst seg at vera júst tann politiski myndilin, sum Chile tørvaði. Lívskorini eru batnaði munandi, og Michelle Bachelet hevur nú sett norðurlendska vælferðarsamfelagið sum mál. Alt bendir á, at hetta fer at eydnast henni. Um allan heim fegnast demokratiskt sinnað fólk um valið í Chile. Hetta val er ein veruligur demokratiskur glotti í einum parti av heiminum, har fólkaræðið hevur trong kor og USA støðugt blandar seg og stuðlar einaræði og afturhaldi. Vónandi er valið av Michelle Bachelet byrjanin til eina nýggja og ljósari tíð í hesum parti av heiminum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Neyðarróp til kinverjar



**GERHARD LOGNBERG**
Løgtingsmaður

Hví legði Høgni Hoydal bein fyri síðstu samgongu, so hon fór í sor? Jú, fyri at sleppa undan tí politikki, sum hann hevði skotið út í kortið, skrivar Gerhard Lognberg

Biðja Kina senda rættleiðing til ST, ja soleiðis sigur Gudmund Alfredson, professari í svari til Høgna Hoydal.

Hetta sigur professarin, tí Føroyar eru ikki limur í ST. Ja, tað sigur ikki so lítið, tá Kina skal verða føroyinga bjarging.

Tjóðveldisflokkurin situr í andstøðu á tingi, og sjálvsagt royna teir at geva samgonguni so nógvan mótgang sum gjørligt. Hetta er nokk politikkur, tá hann er bestur.

Men eg haldi, at Høgni Hoydal og frúurnar í flokkinum fara alt ov vítt, har kastað verður um seg við orðum, ja niðurgerðir um lygn og landasvik.

Hesa tíðina sum samgongan hevur verið í millum Fólkaflokkin, Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin, hava ákoyringarnar ímóti løgmanni verði harðrendar.

Tað hevur verið eygsýnt, at Høgni Hoydal hevur fingið part av Tjóðveldisflokkinum at seta skrivligar fyrispurningar í langar banar, helst fyri at løgmaður skal einki kunna gera, uttan at arbeiða við at svara spurningum frá Høgna Hoydal og Anitu á Fríðriksmørk o. o. Vell, er tað tað sum politikkurin er fyri Høgna Hoydal, so man vera í lagi.

Alt sum er hent í hesi samgonguni er nýðingsgerðir, tað metir Høgni Hoydal. Ikki minst av gorðgangi var, tá ið Íslandssáttmálin var fyri, sum í roynd og veru var eitt politiskt bragd av samgonguni og løgmanni.

Hoyrdi í útvarpinum Annfinn Kallsberg siga, at henda samgonga hevur klárað meira á sjálvstýrisleið, enn undanfarna samgonga, tá samráðingar vóru við Danmark.

Tað sum eg haldi at Høgni Hoydal er desperatur av, er at hansara politikkur er nær um eingin í løtuni og hevur verði eingin leingi.

Hví legði Høgni Hoydal bein fyri síðstu samgongu, so hon fór í sor? Jú, fyri at sleppa undan tí politikki, sum hann hevði skotið út í kortið.

Men nú at sita og kalla onnur fyri líkt og ólíkt, tað ber væl til!

Nei, einki gera hesar týðingarnar, sum eru sendar um Ríkislógartilmæli nøkrum nakað mein, og Føroyar eru hvørki meir ella minni heftar at Danmark, men tað verða føroyingar, sum til eina og hvørja tíð gera av, um Føroyar skulu loysa frá Danmark.

Sjálvt tá kongshúsið var á vitjan í summar, fekk Høgni Hoydal tey fáu orðini hjá Hennara Hátign Dronning Margrethu í rangastrupan, og hevur hann meylað um taluna til nú hetta loysti av.

Men Høgni, eg meti tað sum eina beistagerð ímóti Føroya landi, tá tú sum størsti talsmaður fekk blokkin skornan við 366 mió. kr. Tí tað vóru pengar, sum føroyingar áttu. Tað kann slást rimmar fast, tað hava danskir statsministarir sagt fleiri ferðir, at føroyingar fáa einki úr Danmark. Danskarir fáa líka nógv úr Føroyum.

Høgni Hoydal, legg hasa stríðsøksina til síðis, og rætt løgmanni eina hond, so tú kann siga, at tú er partur av tí positiva, sum hendir í landinum.

Hvat kann mann siga um Kina? Ja, teir hava helst nokk størri trupulleikar enn tey flestu.

Sjálvur haldi eg, at løgmaður skal ikki brúka alla sína orku upp á Høgna Hoydal, tí tað er tað hann vil.

Størsta forakt er ikki at svara aftur, men tað gongur nokk ikki í politikki.

# Jón Ellendersen og sannleikin



**OLE WICH**
Tórshavn

Jón Ellendersen tveitir um seg við skeivum fakta uttan at duga at koma til eina skilagóða niðurstøðu helst av tráan eftir at vísa seg sjálvan og sítt danskarahatur, sigur Ole Wich

Jeg har ikke villet gå ind i en polemik med Jón Ellendersen. For det første fordi hans amatøragtige udgydelser på internettet intet havde at gøre med mit homoFObia-projekt og for det andet fordi hans udsagn var åbenlyst rablende useriøse. At stjæle fra min hjemmeside og sætte mine billeder i forbindelse med nazimærket, hitlerjugend og Hitler er virkeligt langt ude i tovene. Ham om det.

Men når han fortsætter med at lyve om mig, må jeg tage til genmæle. Han skriver nu på sin hjemmeside: »Ole Wich, sum við einum yrkingasavni og í eini grein í Weekendavisen spillur føroyingar út...«. Denne sejlivede løgn, som jeg tit er blevet konfronteret med, bliver ikke mere sand af at blive gentaget.

Fakta er dette. Jeg udgav i 1996 bogen »Ophav« på forlaget Fannir. Den handler om at være dansk på Færøerne i spændet mellem at være ufrivillig repræsentant for en kolonimagt og samtidig være en del af en etnisk minoritet. Bogen kan lånes på biblioteket eller læses på min hjemmeside www.olewich.com. Læs den og døm selv. Selv færinger der bor i Danmark har haft udbytte af at læse den, fordi den handler om de automatmekanismer man kommer ud for som bosiddende i et fremmed land.

Siden skrev Ulrik Høy en omtale og anmeldelse af bogen i Weekendavisen. Artiklen kan fås på biblioteket. Jeg har imidlertid aldrig skrevet noget i Weekendavisen. Ingen af de folk, der nu i 10 år har haft travlt med at sladre om min påståede respektløshed har gidet sætte sig ind i sagerne og læse den bog det hele udspringer af. Det er desværre fakta.

Også Jón Ellendersen jonglerer lystigt rundt med forkerte fakta og er vist ikke i stand til at drage en fornuftig konklusion om noget som helst, sandsynligvis fordi han er blindet af sin iver efter at eksponere sig selv, af sin skinhellighed og sit danskerhad.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.